LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

40 DAGAR Løgtingsvalið 2008

# Løgmaður tveitti sjálvur bleytu málini fyri borð



Val X

EDMUND JOENSEN

Sambandsflokkurin

**Tá trupulleikar stinga seg upp, er tað týdningarmesta, at skiparin varðveitir yvirlitið og ikki leypur framav**

Fleiri klókir knokkar hava roynt at greinað, hvat tað í grundini varð, ið fór fram í Tinginum seinasta hóskvøld, tá tingviðgerðin endaði við, at løgtingsval varð útskrivað.

Mest týðandi tilburðurin er, at Sambandsflokkurin setti mark fyri, hvat hann kann lata sær lynda, nú alt bendir á, at búskaparliga skilið hjá summum í samgonguni er horvið.

Tann mest áhugaverdi tilburðurin hóskvøldið er tó, at løgmaður fullkomiliga leyp framav og útskrivaði val.

Í fyrsta umfari er greitt, at løgmaður fylgdi ikki tingskipanini, grein 51 stk. 3. Hon sigur: "Um so er, at løgmaður uttan um skránna ætlar at geva løgtinginum serliga fráboðan, verður sagt formanninum frá. Formaðurin gevur løgmanni orðið beinanvegin ella seinni á sama fundi".

Í staðin fyri at hugsa seg um, trein løgmaður upp á tingsins røðarapall undir einari 3. viðgerð av einari vallóg og framtúrar, at løgtingsval verður útskrivað til 19. januar 2008.

At val verður 19. januar, vistu øll frammanundan. Og tað sum verri er: Hann útskrivaði val í øðum verkum.

Hvat kundi hann havt gjørt øðrvísi? Jú hann kundi valt at brúkt tíðina frá hóskvøldinum og so leingi, sum freistin var, til at fáa eina røð av løgtingsmálum samtykt. Ein røð av málum lógu klár til 2. viðgerð og kundu soleiðis verðið samtykt, um løgmaður ikki misti nervarnar.

Hevði løgmaður kent og nýtt reglurnar í tingskipanini, kundi formaðurin víst honum langa listan av málum, sum lógu klár til 2. viðgerð. Tey vóru sett á dagsskrá til fríggjadagin, og sostatt kundu tey verið avgreidd, áðrenn val varð útskrivað.

Nú kann ein siga, at nógv av hesum málum ivaleyst verða samtykt av einum komandi løgtingi, og at skaðin sostatt er avmarkaður. Tó er hugstoytt hjá okkum, sum royna at fáa bleytu virðini hægri upp á prioriteringslistan, at løgmaður letur tey detta burtur og nú roynir at misnýta hetta í valstríðnum.

Fyrsta treytin fyri, at ein persónur kann leiða eina samgongu og stýra einum landsstýri, er, at hann kann stýra sær sjálvum.

# Tónleikur, ein útflutningsvøra



Val X

VINJARD JOHANSEN

Formaður á Fjarðafestivalinum

Føroyar kunnu selja seg sum ein tónleikatjóð, um bert vit seta pening av til at marknaðarføra hesa vøru, vit longu nú framleiða og eiga.

Vit eiga nógvar evnaríkar tónleikarar og sangarar her á landi. Dagliga síggja vit nýggjar fløgur við heimagjørdum tilfari koma út á tann føroyska marknaðin. Vit hava eisini sæð nøkur skarað burturúr, nøkur ið hava fingið møguleikan at seta síni spor innan tónleikaheimin uttanlands.

Føroyar kunnu selja seg sum ein tónleikatjóð, um bert vit seta pening av til at marknaðarføra hesa vøru, vit longu nú framleiða og eiga. Her er talan um eina vøru, ið kann geva nógvan pening aftur í landskassan, um farið verður rætt fram. Hetta er nakað man eiga at arbeiða fram ímóti, til eitt komandi løgtingsval.

# Heilsan frá Miðflokkinum til Miðnámsflokkin



Val X

JENIS AV RANA

floksformaður

Fyri Miðflokkin

Vælkomin á politiska pallin!

Hoyra í fjølmiðlunum, at tit kanska fara at broyta navn floksins, tí nøvnini, Miðnámsflokkurin og Miðflokkurin líkjast ov nógv. Uttan iva er tað rætt, men hvat við at leggja flokkanar saman?

Støða okkara til høvuðsmál Miðnámsfloksins er so lík, at vit í felag eiga at kunna náa langt móti málinum- herundir avgerandi at bøta um umstøður teirra lesandi í Hoydølum.

Longu í 2001 legði undirritaði, saman við Jákup Sverra Kass og Kristjan Magnussen, uppskot fyri Løgtingið um at byggja nýggjan studentaskúla í Hoydølum. Uppskotið er dagfest 23. januar 2001, tit finna tað á heimasíðu Løgtingsins sum nr. 53 tað tingárið (sera áhugaverdur lesnaður!) Uppskotið varð tó felt, 11 atkvøddu fyri, ein var blonk og 16 atkvøddu ímóti.

Teir 18 mðr. Miðflokkinum untist at sita í samgongu, frá 2002 til 2004, virkaðu vit fyri at fáa studentaskúla bygdan í Marknagili. Hevði samgongan sitið fáar mánaðir afturat, hevði byggingin verið byrjað, men tíverri legði hon frá sær í ótíð. Og samgongan, ið tók yvir, steðgaði tíverri øllum ætlanum um at byggja studentaskúla í miðstaðarøkinum.

Lat okkum finna saman og virka fyri felags málum okkara, m. a. bygging av studentaskúla í Hoydølum ella í Marknagili og dagføring av skúlaverki og lestrarskipan okkara.

# Sandoyartunnilin samanflættar vón og veruleika



Val X

PÁLL Á REYNATÚGVU

løgtingsmaður

Uppkyknaða kjakið seinastu dagarnar um samtykta Sandoyartunnilin, er í sínum illa undirbygda tabloid-stíli, eitt greitt tekin um at fjølmiðlarnir í Føroyum, eru meira politiskt heftir aktørar, enn gott er, og at partar av føroysku fólkasálini á meginøkinum, er í ferð við sleppa virðunum, sum liggja uttanfyri egnan sjónarring.

**Væl tilrættisløgd ætlan, og væl telvað avgerð**

Líka síðani Vágatunnilin varð liðugur, og meðan Norðoyatunnilin gjørdist veruleiki, hevur ligið í kortinum at Sandoyartunnilin varð næstur í røðini av samanbindandi lívæðrum í samhaldsføstu Føroyum. Og sambært politiska viljanum er ætlanin kannað og fyrireika út í æsir. Gamaní hevur tað tikið drúgvari tíð, enn fleiri av okkum vildu ynskt, men løgtingið hevur á trimum fylgjandi fíggjarlógum játtað pening til Sandoyartunnilin, og øll sum fylgja við í politikki hava sæð hvønn veg tað bar. At ein stórur meiriluti á fólkavalda forum okkara, Føroya Løgtingi, debatterar við 1.viðgerð av málinum, og tekur avgerð og atkvøður við 2.viðgerð og 3.viðgerð, kann, og skal ikki, á nakran hátt lastast nøkrum. Einki frávik í nevndarviðgerð, einki frávik til løgtingsviðgerðir. So her er einki at koma eftir. At løgtingssamtyktin varð hegnisliga væl telvað gjøgnum skipanina, er einki minni enn eitt bragd av øllum okkum á talvborðinum. Takk fyri! At so summir opportunistar í politiskari eginsókn til valið komandi, látast at vakna nú, er ikki serliga álitisvekjandi.

**Hvussu nógv kostar tú... ella er tað aftur loyvt at jakstra minnilutar?**

Ein nýggjur og ódámligur táttur tekur seg upp í politiska kjakrúminum í Føroyum. Summi av okkum eru farin at seta frámerkir, útreiðslufrámerkir á hvønn annan. Skal helst skiljast, sum ein roynd at tykjast skilagóður og rættvísur. Men hesin rættvísi "argumentatíónsformur" minnir ikki sørt um frelsta hugburðin og hugsunarháttin í ráddi hjá ávísum stýrum, áðrenn og undir seinna heimsbardaga í Evropa. Uttan at siga meira, vil eg bara frábiðja mær slík eyðmerkjandi frámerkir í framtíðini. Vit eru øll føroyingar, og hava øll rættin at berjast fyri okkara næstringum, lívi og áhugamálum, og so leingi vit nýta fólkaræðisligan framferðarhátt at náa málinum, eru vit á góðari og rættari leið sum einstaklingar og fólk.

**At vera, ella ikki at vera... partur av samanbundu Føroyum**

Siga vit ja til at Suðuroyggin og Sandoyggin skulu vera livandi partur av Føroyum, so siga vit eisini ja til at skipa farleiðirnar til hesar oyggjar okkara so skilagott og burðardygt, sum til ber uppá longri sikt. Tí ber ikki til av viðgera samtykta Sandoyartunnilin, uttan av viðgera verandi farleið um Hestfjørð, Skopunarfjørð og Suðuroyarfjørð. Raksturin av verandi farleiðum kenna vit, og tí eigur Sandoyartunnilin og komandi Suðuroyartunnilin at setast upp ímóti dagsins rakstri. At ein vegur er betri farleið, enn sjóvegis samband, nýtist ikki at skrivast bøkur um.Alt talar tí fyri at tunnlar til Sandoynna og Suðuroynna eru røttu loysnirnar, skulu suðurføroyar hava møguleika at mennast saman við restini av landinum. So samfelt og vælvirkandi sum norðurøki nú virkar, er spurningurin fyri okkum sunnanfyri skopunarfjørð, at vera ella ikki at vera...

**Einki val**

Vit hava tí einki val. Vit standa øll saman og stríðast fyri okkara framtíð, og komandi ættarliðum okkara. Vit hava nógv at bjóða, saman við tykkum, sum gera tykkara besta hvønn einasta dag. Latið okkum tí í felag verja tær samhaldsføstu loysnirnar. Latið okkum ikki gera Sandoyartunnilin til eitt klandursmál, men í felag byggja føroyar størri og sterkari fyri allar føroyingar. Sandoyartunnilin er okkara farleið frá vón, til veruleika, og tað fer einki av tykkum um tit hjálpa okkum á leiðini!

# Mótmæli móti undirsjóvartunli

Forkvinnurnar og formennirnir í politisku lokalfeløgunum í Norðoyggjum halda tað verða moralskt ósambæriligt at nývaldi formaðurin í Norðoyatunnlinum alment arbeiðir ímóti at suðurøkið verður knýtt at meginøkinum.

Vit eftirlýsa eisini almennar grundgevingar fyri hví Bjarni Askham Bjarnason er vorðin formaður fyri Norðoya Tunnilin.

**Absalon í Buð**
formaður í Norðoya Fólkaflokksfelag

**Signhild Joensen**
forkvinna í Norðoya Javnaðarfelag

**Signy Hansen**
forkvinna í Norðoya Tjóðveldisfelag

**Jan A. Joensen**
formaður í Norðoya Sjálvstýrisfelag

**John William Joensen**
formaður í Norðoya Sambandsfelag